

## Ein ordans "risi"

Hesin kalvin smæðist ikki burtur millum aðrar stórar kalvar, sum veiddir eru undir Føroyum. Tað var ísfiskatrolarin Vesturbúgvin, sum fekk henda kalvan í trolið á seinasta túri. Hann var heilar 272 cm. langur og vigaði 440 pund! Ein ordans fiskur, má sigast. Jónálvur Andreasen, sum hevur arbeitt á fiskavirkinum í Vestmanna í samfull 30 ár, heldur, at hetta er ein tann størsti kalvin, sum er landaður í Vestmanna í longri tíð. Umborð á Vesturbúgvanum minnast teir seg ikki at hava fingið ein so stóran kalva áður. Ísfiskatrolarin landaði annars 170.000 pund av upsa í Vestmanna í mánadagin.

# Anfinn fekk ein ordans u



**Í herviliga ódnarveðrinum herfyri tók ein hørð hvirla Anfinn Kallsberg, sum saman við øðrum var í holt við at bjarga tveimum fjósum á Viðareiði.**
**- Eg helt í ein lastbil, tá ið hvirlan kom, men hon skræddi meg leysan, og eg fór sendandi meira enn 10 metrar gjøgnum luftina. Eg minnist, tá ið eg misti takið, men eg áni ikki, hvussu eg var komin heilt hagar, eg lá, tá ið avtornaði, sigur fyrrverandi løgmaður**

SKAÐI

*Orð: Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Berghild Kallsberg*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósdagin 31. januar var av allar ringasta veðri og skaðavindur um meginpartin av landinum. Ættin var landnyrðingur, sum út á seinnapartin og kvøldið hækkaði upp í ein landnyrðing norðan. Tað var kolandi stormur, og vegirnir gjørdust kraputir nógvastaðni. Almenna ferðslan helt uppat at koyra, og á nógvum arbeiðsplássum fóru fólk tíðliga til húsar. Tað vóru eisini tey, sum noyddust at hanga eftir á arbeiðsplássunum nakað út á seinnapartin, og av hesum mundu mong hava ein óbehagiligan túr heim til húsa.

Í illveðrinum hendu nógvir materiellir skaðar kring landið – ikki minst í Skálavík, har flestu bátar í bygdini fórust og í Gøtu, har stormurin eisini gjørdi feigdina um seg. Í Noyðoyggjum hendu eisini skaðar á hús, bygningar og bátar, og eitt nú misti kappróðrarfelagið í Sundunum onkrar av sínum bátum, tá ið brimið breyt seg niðan gjøgnum neystini.

Vit vildu ynskt, at vit nú kundu sagt, at hóast veðrið leikaði í og gjørdi feigdina um seg kring um landið, hendi eingin mansskaði.

Myndirnar, sum vit prenta saman við hesi greinini, vísa tó, at mannskaði hendi – um enn tað kundi verið uppaftur verri, um verri vildi til.

### Hjálptu til úti

Mong vóru tey, sum kring um landið veittu hjálpandi hond, tá ið tekjur byrjaðu at ríva, vindeygu brotnaðu, og hurðar ikki kláraðu at standa ímóti nógva storminum.

Á Viðareiði var eisini kolandi stormur hendan dagin, og bygdin slapp ikki óskalað.

Anfinn Kallsberg, sum vit øll kenna úr politiska lívinum – og ikki minst sum ein siðiligan og sáttligan løgmann, var millum teirra, sum hendan dagin veittu hjálpandi hond í bygdini, tá ið harðast leikaði á.

- Hann var landnyrðingur norðan og kanska norðan í ættini, tá ið vindurin var mestur. Her var kolandi stormur alla dagin – ja faktiskt himmalsins ódn, sum hann tekur til.

Anfinn sigur, at stormurin hevði gjørt um seg fleiri staðni á Viðareiði og eitt nú fyrsti skúlin í bygdini, sum hevur verið fyri hóttafalli, fór av grundini.

- Klokkan var um 18.30 hetta hóskvøldið, tá ið vit vóru í holt við at byrgja uppfyri, at størri skaði stóðst á tey bæði stóru fjósini eystanfyri bygdina. Onkrar plátur vóru farnar á takinum, og vit royndu at breiða útyvir. Eisini stóð nógv á hurðunum.

### Anfinn skaddur

Hann sigur, at teir vóru fleiri mans til verka í bygdini hetta kvøldið.

- Hvirlurnar vóru títtar og harðar við onkrum lítlum skáa ímillum tær. So kemur hendan eina og ógvuliga harða hvirlan oman av. Vit kendu á okkum, at hon kundi gera um seg, og tí hildu vit okkum fast í ein lastbil, sum stóð har. Onkur misti ella slepti takinum og legði seg niður. Tá ið hvirlan er komin oman til okkara, vendir hon og kemur líka sum øvutan veg niðan yvir okkum aftur.

Og Anfinn heldur fram:

- Hendan hvirlan skræddi meg leysan, og eg fór sendandi gjøgnum luftina. Eg minnist, tá ið eg misti takið, men eg áni ikki, hvussu eg var komin heilt hagar, eg lá, tá ið avtornaði. Kortini minnist eg, tá ið eg lá har.

Hann sigur, at eingin tíð var til umhugsunar, tí alt hendi upp á sekundir.

- Eg kann ikki siga, at eg hugsaði nakað serligt, tí alt gekk ógvuliga skjótt fyri seg. Tað var kjálkabeinið undir høgra eyga, sum tók niður í hart grót-og betongtilfar, men eg haldi ikki, at stoyturin var heilt frontalur. Kjálkin stoytti niður á og líka sum streyk eitt lítið sindur framvið.

Meðan Anfinn lá við vegkantin, hugsaði hann, at "nú er okkurt – og nú er ikki væl vorðið".

- Menninir vóru ógvuliga skjótir yvir til mín og fingu meg uppaftur á føtur. Eg minnist, at teir spurdu, um eg hevði fingið skaða – og eg segði ja. Sjálvur haldi eg ikki, at eg nakrantíð var uttan vit, men alt hendi bara so ógvuliga knappliga og óvæntað, at eg fekk ikki stundir at fylgja gongdini, fyrr enn eg var tikin við hvirluni, og skaðin var hendur.

### Vegurin stongdur

Anfinn bløddi nakað úr nøs og munni, og onkur riva var komin í sjálvan kjálkan, men hetta vóru ikki so djúpar rivur.

- Eg føldi beinanvegin, at vinstri kjálki bólgnaði upp. Vangin líka sum doyvdist,